# Nú ræður um hondskriftina

**FSF hevur lagt allar dómaraseðlarnar frá dystunum í bestu deildini í fjør á heimasíðuna, og teir hava ætlanir um at leggja fleiri gamlar og allar teir nýggju seðlarnar á somu síðu**

HAGTALSLIGT SKARVSLOP
*Jóannes Hansen*

Tey, sum hava fingist við hagtøl í fótbólti, vita, at primera keldan til sovorðið tilfar, er dómaraseðlarnir. Tey vita eisini, at tað er meiri enn so komið fyri, at skrivingin og skrásetingin á dómaraseðlunum hevur verið so sum so. Tað er ikki altíð, at tað tykist hava verið greitt fyri teimum liðformonnum ella liðleiðarum og dómarum, sum hava skrivað, at tað, sum teir hava tikist við, er eitt tað týdningarmiklasta søguliga tilfarið, sum tey, ið hava hagtølini sum arbeið og/-ella áhuga, hava møguleika at nýta sum dokumentatión fyri einstøku dystunum.

Hvussu ábyrgdarpersónarnir fyri dómaraseðlunum komu frá uppgávunum í fjør, ber tað nú rættuliga ómakaleyst til at síggja við egnum eygum. Fótbóltssambandið hevur skannað allar 90 dómaraseðlarnar frá kappingini í 1. deild í fjør og lagt teir á heimasíðu sína, football.fo. Á heimasíðuni verður sagt, at teir í FSF hava ætlanir um at fara longri aftur í tíðina, og at teir eisini hava ætlanir um at allir dómaraseðlarnir í kappingini, sum stendur fyri framman og framtíðar kappingum yvirhøvur, skulu leggjast á heimasíðuna.

Tiltakið tænir FSF og heimasíðuni til miklan sóma. Spurningurin hjá teimum, sum ætla sær ella droyma um at fáa gagn av tænastuni, er nú, hvussu væl tað fer at eydnast hjá teimum í FSF fyrisitingini at gera framtíðar ætlanirnar hesum viðvíkjandi til veruleika. At teir fara at megna at fáa tilfarið, sum teimum fer at koma í hendi, á heimasíðuna bæði skjótt og væl er einki at ivast í.

Spurningurin er heldur, um tey, sum hava ábyrgdina av at fáa seðlarnar á FSF skrivstovuna - og tað eru dómararnir - fara at syrgja fyri hesum uppaftur skjótari, enn teir hava gjørt tað higartil. Lítil ivi man vera í, at allir liðformenn ella liðleiðarar og allir dómarar fara at taka skrivingina og skrásetingina av útskiftingum og innskiftingum og gulum og reyðum kortum og málskjúttum og tíðarbilinum, tá ið málini eru skorað, í uppaftur størri álvara, enn tað higartil hevur verið gjørt. Talan verður jú um alment eftirlit!




*Nú ber til at fara inn á heimasíðuna hjá fótbóltssambandinum at síggja dómaraseðlar frá kappingarárinum í fjør. FSF ætlar at allir dómaraseðlarnir framyvir skulu leggjast út á netið*

# Bíða eftir suðurafrikananum

Í B36 bíða tey í spenningi eftir, at suðurafrikanski áleyparin, Obele Okeke Onyebuchi, skal koma til landið. Umboð fyri felagið hava til fánýtis verið á flogvøllinum í Vágum eftir spælaranum, sum ikki hevur verið við flogfarinum.

Bæði týsdagin og mikudagin skuldi suðurafrikanin koma til landið, men trupulleikar við pappírunum hava seinkað honum, stendur at lesa á heimasíðuni hjá B36.

Samstundis verður sagt, at Obele Okeke Onyebuchi við vissu kemur til landið við flogfari í dag.

tn

# Tvey stig til KÍF




*Kvinnurnar hjá KÍF vunnu mikukvøldið 3-0 á SÍ í Hoyvíkshøllini.*
*savnsmynd*

**Ein dystur í meistaradeildini hjá kvinnum í flogbólti var leiktur í Hoyvíkshøllini mikukvøldið**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Dysturin var millum tvey tey niðastu liðini á stigatalvuni, KÍF og SÍ, og tað var heimaliðið KÍF, sum streyk avstað við sigrinum.

## SÍ beit væl frá sær

Í fyrsta settinum sá tað út til, at liðið úr Kollafirði fór at gera skjótt av, tí tær sópaðu snøgt sagt sørvágskvinnur av vøllinum, og KÍF vann settið 25-10.

Men tað eydnaðist SÍ at rista hvøkkin frá fyrsta settinum av sær, og dysturin gjørdi sera javnur og spennandi.

Liðini skiftust um at hava leiðsluna, men tá ið avtornaði var tað KÍF, sum hevði munin, men neyðugt var at spæla upp til 26, áðrenn liðið úr Kollafirði hevði tryggjað sær settið 26-24.

Í triðja settinum var spenningurin ikki minni, og leingi sá tað út til, at SÍ fór at tryggja sær settið, men einaferð dróg KÍF longra stráið og vann settið 27-25.

Við 3-0 sigrinum hevur KÍF nú seks stig, meðan SÍ er aftast við tveimum stigum. Hevði SÍ vunnið dystin mikukvøldið, vóru tær komnar ájavnt við KÍF í stigum, men kollfjarðakvinnur hava betri settmun.

**KÍF-SÍ 3-0 (25-10, 26-24, 27-25)**

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 16 | 13 | - | 3 | 41 | 15 | 26 | 17 |
| 2 TB | 16 | 13 | - | 3 | 38 | 23 | 15 | 17 |
| 3 Dráttur | 16 | 10 | - | 6 | 39 | 24 | 15 | 16 |
| 4 ÍF | 16 | 7 | - | 9 | 25 | 29 | -4 | 10 |
| 5 KÍF | 17 | 5 | - | 12 | 19 | 39 | -20 | 6 |
| 6 SÍ | 17 | 1 | - | 16 | 11 | 49 | -38 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 13 | 11 | - | 2 | 34 | 12 | 22 | 15 |
| 2 Fleyr | 13 | 9 | - | 4 | 31 | 20 | 11 | 13 |
| 3 Mjølnir | 12 | 8 | - | 4 | 28 | 16 | 12 | 10 |
| 4 ÍF | 13 | 3 | - | 10 | 14 | 33 | -19 | 5 |
| 5 Fram | 13 | 1 | - | 12 | 11 | 37 | -26 | 1 |